# Kópur á matskránni

Tvær av teimum best kendu matstovunum í kanadiska býnum Montreal hava nú sett kópahjarta og roykt kópakjøt á matskránna. Stjórin á matstovuni Les Iles en Ville, Andree Garcia, sigur við grønlendska kringvarpið, at fleiri viðskiftafólk hava biðið um at fáa rátt kópahjarta, men tað vil matstovan ikki borðreiða við, sigur hann. Tað er ikki av tilvild, at fólk niðja um rátt kópahjarta, tí fjølmiðlar hava gjørt nógv burturúr, at generalguvernørurin Michelle Jean át eitt petti av einum ráðum kópahjarta á einum hátíðarhaldi í síðstu viku.



# Tingast um lán frá russum

Í vikuni fara umboð fyri íslendsku stjórnina til Moskva at tingast við russisku stjórnina um lánið, sum russar hava boðið íslendingum. Tað segði russiski varafíggjarmálaráðharrin, Dmitrí Pankin, við Reuters-tíðindastovuna í gjár, og seinni váttaði íslendski fíggjarmálaráðharrin, Steinrímur J. Sigfússon, tíðindini. Dmitri Pankin vil ikki siga, hvussu nógvar pengar íslendingar fáa tilboð um. Tá málið bleiv umrøtt seinasta heyst, varð nevnt, at lánið var fýra milliardir evrur, men tað talið minkaði seinni, skrivar Morgunblaðið. Sum skilst skal russiska tjóðartingið eisini góðkenna lánið, áðrenn stjórnin kann lata tað.







*Tað var sum á ólavsøku í Havn. Tað einasta, sum manglaði, var fólk í føroyskum klæðum*

*Myndir: Jens Kristian Vang*

Hvat viðvíkur innandura tiltøkunum, endaði SIC kvøldið við at vísa hvat bólkurin hevði arbeitt við, síðan hann fyrr í ár fekk til uppgávu at gera lag til eina upptøku av biltúri gjøgnum Havnina, sum Landsverkfrøðingurin gjørdi í 1977. Hendan framførslan lokkaði so mikið nógv fólk í Tjóðpallin, at flestu okkara máttu taka til takkar við einum plássi í túninum. Og tað var ivaleysa hart.

Mentanarnáttin var at samanbera við ólavsøku, og var havt á munni, at talan var um lítlu ólavsøku. Illa ber til at seta tal á hvussu nógv fólk vóru í gøtuni hetta kvøldið og náttina, men góða lagið og veðrið gjørdu uttan iva sítt til at smíl sást flestu varrum hesa lítlu ólavsøku.



*SIC hevði gjørt eitt rættiliga tungmálmslag til biltúrin gjøgnum Havnina, sum Landsverkfrøðingurin tók upp í 1977*

*Mynd: David Nilssen*

















*Túnabóltur við pensioneraðum fótbóltskempum, Riddarakrossur frá 200, Undirbeat og serligar ballónir helt fólki í gøtunum til út á náttina*

*Myndir: Jens Kristian Vang*